# Hvannasund – sundur ella san



**Sjáldan hava fleiri fólk verið til ein bygdaráðsfund í Hvannasundi enn í gjárkvøldið. Hetta var ikki uttan orsøk, tí eitt mál um samanlegging við Klaksvík var høvuðsmálið. Ein meiriluti í bygdaráðnum samtykti at hava fólkaatkvøðu mikudagin 17. september um henda spurningin. Tá kann Hvannasunds kommuna fara í søguna!**

REPORTASJA
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hvannasund:** Tríggir fyri. Og tvey ímóti.

Tað var úrslitið av atkvøðugreiðsluni í bygdaráðnum í Hvannasundi, tá málið um møguliga samanlegging við Klaksvík var fyri. Fyri uppskotinum atkvøddu varaborgarstjórin Pól Fuglø, Elmar Simonsen og Niels í Buð, meðan borgarstjórin Júst Poulsen og Veronika Petersen vóru ímóti.

Hóast tey flestu mundu vita, hvat úrslit ið bygdaráðið fór at koma til, var kortini fylgt við áhuga í tí, sum kom fram.

Eftir uppskotinum frá meirilutan skulu borgararnir kunnast væl og virðiliga um málið. Eftir skránni kemur faldarin út nú; ein borgarafundur haldast mánakvøldið 15. september; fólkaatkvøða verður mikudagin 17. september og dagin eftir, altso hósdagin 18. september skal bygdaráðið viðgera úrslitið av fólkaatkvøðuni.

Verður meiriluti fyri eini samanlegging verður Hvannasunds kommuna ikki til meiri, tí fara tær fimm bygdirnar í kommununi – Hvannasund, Norðdepil, Depil, Múli og Norðtoftir – uppí ta stóru Norðoya Kommunu.

Verður hinvegin ikki meiriluti, ja so »fyriliggur ein nýggj støða«, sum tikið verður til!

## Borgarstjórin ikki við

Í drúgva tíð hevur hetta málið um ætlaðu samanleggingina við Klaksvík verið frammi í Hvannasunds kommunu.

Tað hevur verið uppi og vent á fundum í bygdaráðnum, og á einum teirra varð so ein nevnd vald at skipa samráðingarnar, soleiðis at tær fimm bygdirnar kundu fáa sum frægast burtur úr hesi samanleggingini.

Sum vanligt er, átti borgarstjórin, Júst Poulsen at verið fastur limur í hesi nevnd og staðið fyri samráðingunum. Men stutt eftir at hann var valdur, tók hann seg kortini úr, tí hann ikki var fyri at leggja hansara kommunu saman við Klaksvík.

Hesa tíðina, ið samráðingarnar tí hava verið, hevur tað ístaðin verið varaborgarstjórin, Pól Fuglø sum hevur staðið á odda fyri umboðunum úr Hvannasundi.

Úrslitið av hesum samráðingum er nú greitt: Ein faldari er gjørdur og verður sendur øllum húskjum í Hvannasunds kommunu í dag ella í morgin.

Her verður greitt frá teimum ætlanum, sum skulu fremjast í framtíðini, og hvussu ein skal skipa ta tíðina, sum Hvannasunds kommuna hevur eftir á lívi, áðrenn hon hvørvur sum navn og heiti, og gerst partur av teirri stóru Norðoya Kommuna.

## "Order! Order!"

Tað er ikki ofta, at umboð fyri bæði blað og útvarpsrás eru á bygdaráðsfundi í Hvannasundi.

Sosialurin og Rás2 hava viðgjørt hetta málið í seinastuni, og hava vitjað fleiri ferðir í økinum fyri líkasum at lodda dýpið millum teir 436 borgararnar í teimum fimm bygdunum í kommununi.

At málið um samanleggingina veruliga hevur áhuga millum sundafólk, var fundurin í gjár eitt fullgott prógv um. Fundarsalurin hevur sjáldan verið meiri fullsettur av spentum áhoyrarum, sum her fingu møguleika at hoyra og síggja teirra kosnu umboð viðgera hetta álvarsmálið.

Talið av áhoyrarum kundi heilt víst verið munandi størri, men tað skiltist á prátinum at nógvir mans, sum annars høvdu áhuga í málinum, vóru farnir eftir náta í góðveðrinum í gjár. Fyri aðrar kundu nátar vera nátar hesa løtuna!

Onnur vóru kanska meiri komin fyri upplivingina, fyri at fáa at vita, hvussu góður – ella vánaligur – samstarvsandin er í bygdaráðnum. Og tað mundu tey helst eisini fáa fullan valuta fyri: Her komu eingi boð um at fáa peningin fyri atgongumerkið aftur!

Gjøgnum allan fundin var persónligt brigsl at hoyra, soleiðis at málini ofta fóru heilt skeiva kós. Var tað ikki fyri einastu kvinnuna í bygdaráðnum, hevði fundurin helst verið munandi drúgvari enn teir tveir tímarnar, sum hann annars vardi!

- Gloym alt hatta persónliga. Koma tit ikki burtur úr hasum, so verða eingi mál loyst, royndi Veronika Petersen sum frægast at fáa »order, order« millum teir fýra mannligu bygdaráðslimirnar.

## Tøl og paragraffir

Á bygdaráðsfundinum í gjárkvøldið kom helst týðiligari enn nakrantíð fram, hvussu vánaligt samstarvið er og hvussu ósamdir limirnir í bygdaráðnum í roynd og veru eru – ikki bert í hesum málinum, men í rættiliga mongum øðrum málum eisini.

Hinvegin helt onkur áhoyrari fyri, at hetta hevði verið ein av teimum allar frægastu fundunum. Teir høvdu mangan verið meiri ófriðarligir enn hesin.

Kanska dempaðu teir seg eitt sindur við hetta høvið av fýra ymiskum orsøkum: Nógv fólk vóru til staðar í fundarsalinum, ið eisini verður brúktur til kristilig tiltøk. Tí umboð fyri Sosialin og Rás2 vóru til staðar. Tí borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen var millum áhoyrararnar. Og tí at eitt starvsfólk á grannskoðarafyritøku var komið

*Fólkið í Hvannasunds kommunu skal avg*



*Málið um samanleggingina hevði stóran áhuga millum bygdarfólkið. Tað kom meiri enn so fyri at fólk svaraðu til úr salinum á livandi bygdaráðsfundinum í Hvannasundi í gjárkvøldið*



*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen kom eisini á fundin. Verður meiriluti fyri samanlegging; verður hann afturvaldur í býráðið í Klaksvík og verður hann aftur borgarstjóri, so verður hann eisini borgarstjóri fyri Norðoya Kommunu og fólkið á fundinum*



*Borgarstjórin Júst Poulsen og Veronika Petersen eru ikki fyri samanlegging við Klaksvík. Tey meta at málið er skrumblað ígjøgnum og at tað tí ikki er búgvið til at verða ført út í lívið*